# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Bioanalytikarar

Á Rannsóknarstovuni eru 2 barnsburðar farloyvisstørv leys at søkja frá:

- 1. mars 2009 til og við eitt ár fram
- 1. mai 2009 ella eftir avtalu til og við eitt ár fram

Eisini eru nøkur summaravloysarastørv leys at søkja til setan frá:

- 1. mai 2009 til og við 30. september 2009. Tú kanst søkja alt skeiðið ella eftir avtalu.

Rannsóknarstovan heldur til í nýggjum hølum, hevur góðar arbeiðsumstøður og hevur eitt integrerað laboratorium, har øll 5 serøkini innan bioanalytikarafakið eru umboðað, umframt ambulatorium á Landssjúkrahúsinum og á læknamiðstøðini í Runavík.

Í løtuni starvast uml. 25 bioanalytikarar, 2 skrivarar og 1 hjálparfólk og ein patologur. Allir bioanalytikararnir skifta millum tey ymsu serøkini.

Høvuðsarbeiðsøkið verður í byrjanini innan kliniska biokemi.

**Førleikakrøv**
- Bioanalytikaraútbúgving
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðandi bioanalytikara Ivy Hansen, tlf. 304599, lokal 5601 ella teldupost: lsivyha@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 20. februar 2009 kl. 12.00**

## Skrivari til Starvsfólkadeildina

Søkt verður eftir fulltíðaravloysara fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi til setan 16. februar 2009. Møguleiki er fyri leingjan.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at fara inn á heimasíðu okkara www.lsh.fo

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G4**
Umsóknarfreistin er 23. januar 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B7**
Umsóknarfreistin er 26. januar 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Barnadeildina B5**
Umsóknarfreistin er 30. januar 2009 kl. 12.00

**Ergoterapeutur**
Umsóknarfreistin er 2. februar 2009 kl. 12.00

## Arbeiðsfólk og reingerðarfólk

Til Tænastudeildina verður søkt eftir arbeiðsfólki at byrja skjótast gjørligt. Deildin er ein partur av Tænastudeplinum, har tað eru 7 aðrar deildir.

**Starvsinnihald**
Starvið umfatar vørukoyring, inni- og útiarbeiði og til tíðir tungt arbeiði. Viðkomandi skal verða fryntlig/ur, fyrikomandi og hava góða heilsu. Umsøkjarar við stóra koyrikortinum hava fyrimun.

Samstundis verður søkt eftir tveimum reingerðarfólkum til setan skjótast gjørligt.

Talan er um manuella reingerð.

Í Tænastudeildini arbeiða umleið 65 fólk. Í deildini er ein dámligur og óhátíðarligur samverutóni, og tú fært eina góða innleiðslu.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Heimir Ottósson, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 1270, har tað eisini ber til at tosa um arbeiðstíðina og starvsbrøkin.

**Umsóknarfreistin er 6. februar 2009 kl. 12.00**

## Fysioterapeutur

Søkt verður eftir avloysara til Fysioterapideildina á Landssjúkrahúsinum til setan 15. februar 2009 til og við 30. juni 2009. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

Á Landssjúkrahúsinum eru ymiskar sergreinir, og er fysioterapi ein týðandi partur av viðgerð, sum er knýtt at hesum sergreinum.

**Vit bjóða:**
- eitt arbeiðsumhvørvi við skiftandi arbeiðsuppgávum
- engageraðar starvsfelagar
- fakligar avbjóðingar

**Vit vænta:**
- ágrýtni
- góð samstarvsevni
- opinleika og neyvt samstarv við aðrar fakbólkar

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving sum fysioterapeutur við góðkenning

Á fysioterapideildini eru 12 fulltíðarstørv: 1 leiðandi fysioterapeutur, 1 deildarfysioterapeutur, 12 fysioterapeutar og 1 heilsurøktari, í alt 14 fólk.

Nærri fæst at vita um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Karin Djurhuus, leiðandi fysioterapeut, lskardj@ls.fo, tlf. 304500, lokal 5797.

**Umsóknarfreistin er 6. februar 2009 kl 12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!